Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Liljan Weihe, løgtingskvinna

Svarari: Bárður á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum

Evni: Sernám og dagstovnaøkið

Spurningar:

1. Hvørja ávirkan fer samanleggingin av Sernámi og Undirvísingarstýrinum at hava á dagstovnaøkið?
2. Hvussu verður tryggjað, at dagstovnar fáa skjóta, dygdargóða og atkomiliga sernámsfrøðiliga ráðgeving?
3. Hvussu verður dagstovnaøkið formliga umboðað í nýggju bygnaðarligu skipanini?
4. Hvørjar ætlanir hevur landsstýrismaðurin um at styrkja fyribyrgjandi og inkluderandi arbeiðið í dagstovnum?
5. Fer landsstýrismaðurin at taka stig til eina greiðari skipan fyri ábyrgdarbýti og samstarv millum kommunur, dagstovnar, Sernám og landsmyndugleikar í sambandi við børn við serligum tørvi?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at frá 1. juni í ár verður Sernám skipað sum ein deild í Undirvísingarstýrinum. Sagt verður, at endamálið er at skapa størri samanhang millum sernámsfrøðiliga virksemið og undirvísingarøkið sum heild.

Sernám arbeiðir tó ikki bert við børnum í skúlaaldri, men er landsumfatandi stovnur, sum arbeiðir við børnum frá 0-18 ár. Tí er vert at hava í geyma, at hóast dagstovnaøkið er kommunalt, so veitir Sernám eisini fakliga ráðgeving og stuðul til børn í dagstovnaldri, har grundarlagið undir læring, menning og trivnaði hjá børnum verður lagt.

Fyribyrging, inklusjón, skjót og góð ráðgeving og gott tvørfakligt samstarv hevur tí alstóran týdning fyri børn – eisini, ella kanska serliga, áðrenn skúlaaldur.

Hóast dagstovnaøkið er kommunalt, so setur landið karmarnar fyri virksemið. Tað eru tíverri javnan dømi um, at serliga børn við serligum tørvi detta niður ímillum skipanir og ábyrgdarøkini hjá landi og kommunum.

Tí verður spurt um, hvussu hetta økið verður raðfest og tryggjað í nýggja bygnaðinum hjá Sernámi undir Undirvísingarstýrinum, og hvussu samstarvið millum land og kommunur verður skipað.

Á Løgtingi, 11. juni 2026

Liljan Weihe